# Regin Vágadal kappast um norðurlanda meistaraheitið

**Enn hevur Føroya sterkasti maður ikki tikið støðu til, um hann verður við í kappingini um heimsins sterkasta mann í heyst**

STERKIR MENN
*Páll Holm Johannesen*

Um vikuskiftið fer Føroya sterkasti maður, Regin Vágadal, at kappast um norðurlendska meistaraheitið.

Regin hevur, vegna skaða í rygginum, bert luttikið í einari kapping í ár, men kortini kennir hann seg væl fyri.

– Eg eri 10 kilo lættari, enn eg plagi, og skjótleikin og kondtiónin eru betraði munandi, so eg skuldi verið væl fyri, sigur Regin Vágadal, sum fer av landinum í dag.



*Regin Vágadal skal um vikuskiftið kappast um norðurlandameistarheitið, har m.a. heimsins sterkastu menn seinastu trý árini luttaka*

*Savnsmynd*

## Sterk kapping

Hóast talan bert er um norðurlandameistaraheitið, so kappingin sera sterk. Heimsmeistararnir seinastu trý árini, koma allir úr Norðurlondum, og teir tríggir Magnus Samuelson, Jannie Virtanen og Svend Karlsen hava allir boða frá luttøku.

Umframt Regin, Magnus, Jannie og Svend, so eru seks luttakarar afturat, so luttakaratalið er 10 til kappingina.

Hetta verður fyrstu ferð, Regin Vágadal kappast um norðurlandameistarheitið, og spurdur um hvørjar vónir, hann hevði undan kappingini, sigur Regin, at tað er ilt at siga frammanundan, men greinirnar í kappingini hóska væl til sín, og tí vónar hann at fáa eitt gott úrslit.

Regin hevur onki hjálparfólk við sær á túrinum, og fer tí einsamallur avstað. Regin vísur á, at hann ikki fíggjarliga orku til at hava hjálparfólk við sær, og tað er stak óheppið. Hann er tó fegin um tann stuðul, hann fær, tí annars hevði ikki verið møguligt at farið til kappingina.

Stuðlar hjá Regini eru, Føroya Tele, Vestlaks, Atlantic Airways, Ísbjørnin og JFK Kjølbro.

## Møguliga til Malaysia í septembur

Regin Vágadal hevur ikki enn tikið støðu, um hann verður við í kappingini um heimsins sterkasta mann í Malaysia í septembur. Sjálvur sigur Regin, at alt valdast, hvussu tað fer at ganga um vikuskiftið.

Regin hevur eisini eina innbjóðing til eina kapping í Peking í oktober, og har hevur hann heldur ikki tikið støðu til, um hann verður við.

# ÍSF sett ítrótta- og ungdómsráðgeva

TÍÐINDASKRIV

Ítróttasamband Føroya hevur í longri tíð arbeitt við ætlanum um at seta ein ítróttaráðgeva, og nú hevur ÍSF sett 31 ára gamla Sølva Reinert Hansen í starv sum ítrótta- og ungdómsráðgevi.

Sølvi hevur sjey tey seinastu árini starvast sum miðnámskúlalærari og lestrarvegleiðari. Samstundis hevur hann drúgvar royndir innan ítrótt bæði sum aktivur og sum fyriskipari.

Londini kring okkum hava havt ítróttaráðgevar í nógv ár, og tørvurin í Føroyum er stórur, tá hugsað verður um, at ÍSF skal virka til fyrimuns hjá 15.000 ítróttarfólkum, ið eru virkin í teimum 120 feløgunum kring landið.

Starvið verður fíggjað við parti av veddingarpenginum, sum Mentamálaráðið umsitur. Fyribils er játtan latin til tvey ár, men arbeitt verður miðvíst við at fáa ítrótta- og ungdómsráðgevan á fíggjarlógina.

Virkisøkið hjá ítrótta- og ungdómsráðgevanum er fjøltáttað. Skipast skal fyri ymsum tiltøkum, ið kunnu betra um karmarnar hjá børnum og ungum at íðka ítrótt í Føroyum.

Í samráð við ítróttafeløg kring landið skal skipast fyri skeiðum fyri ítróttarleiðarum, ið kunnu bøta um fakligu dygdina og geva íblástur til dagliga arbeiðið í feløgunum.

Ítrótta- og ungdómsráðgevin skal eisini royna at betra um samstarvið millum ítróttarfeløg og skúlan.

Dagliga starvsstaðið verður ÍSF-húsið í Gundadali, og ætlanin er, at húsið skal hava regluligar avgreiðslutíðir, so fyrispurningar kunnu svarast og hjálp veitast, tá tørvur er á tí.



*Sølv Reinert Hansen verður nýggjur ítrótta- og ungdómsráðgevi hjá ÍSF*

## Berti Vogts langar út eftir FSF

**Skotski landsliðsvenjarin heldur, at tað er løgið at teir ikki kunnu spæla móti Føroyum á Tórsvølli, tá Týskland kann**

LANDLIÐIÐ
*Bjartur Nolsøe*

Sambært heimasíðuni hjá BBC, hevur skotski landsliðsvenjarin Berti Vogts átalað, at Føroyar og Skotland skulu spæla á Toftum, og ikki á Tórsvølli.

Berti Vogts hevði vónað, at dysturin 7 sept. varð lagdur á Tórsvølli, sum bert liggur 5 minuttir frá hotellinum, har teir skulu gista.

Nú skal skotska ferðalagið í staðin ferðast við skipið, bussi ella svimja til Toftir, sum hann tekur til.

Berti Vogts sigur við BBC at tað er løgið, at FSF kann siga at Tórsvøllur ikki er klárur fyrr enn í apríl 2003, tá Føroyar skulu møta Liechtenstein í næstu viku á netupp Tórsvølli.

Ísak Mikladal hevur svarað, at tá Liechtenstein kemur á vitjan í næstu viku, eru bert okkurt um 800 áskoðarar, og ógvuliga fá pressufólk.

Annars er tað ikki gestirnir sum avgera hvar dystirnir verða spældir, men vit í Føroyum, sigur Ísak Mikladal.


Í Býin














Í Býin

























